# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fimleikaframsýningar í hópatali hesa vikuna



Havnar Fimleikafelag fyllir 100 ár seinni í ár og hevur um 1.200 limir. Felagið hevur tríggjar framsýningar í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin og eina mánakvøldið



Støkk hevur 650 íðkandi limir, og tí eru framsýningarnar í ár í ítróttarhøllini í Runavík tríggjar í tali. Tann fyrsta verður í annaðkvøld og hinar leygardagin og sunnudagin

**Bæði Støkk og Havnar Fimleikafelag fara hesa vikuna at hava sínar árligu fimleikaframsýningar, sum verða fleiri í tali hjá báðum feløgum**

FIMLEIKUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Fyrst á skránni er fimleikafelagið Støkk, sum hevur allar sínar framsýningar í ítróttarhøllini í Runavík. Liðini eru mong í tali, tí felagið stendur í vøkstri og hevur nú 650 íðkandi limir, so av tí sama verða ikki færri enn tríggjar framsýningarnar í ár.

Tann fyrsta verður í annaðkvøld klokkan 18, tá børn undir skúlaaldur vísa síni kynstur. Hildið verður so fram leygardagin og sunnudagin, báðar dagar klokkan 15, og tá eru liðini eitt sindur meira blandað. Nærri skrá fyri dagarnar sæst á heimasíðu felagsins, www.stokk.net.

Støkk hevur nógvan og fjølbroyttan fimleik at vísa fram, so sum foreldur og børn, børn undir skúlaaldur, vanligu liðini frá 1. til 10. flokk, kvinnur, blandað lið við kvinnum og monnum, kappingarlið í reiðskapi og estetisk kappingarlið. Undir framsýningum verða merki og ídnisprógv handað, og allar dagarnar verður eisini skipað fyri páskareggjatombola.

### Fyllir 100 í ár

Havnar Fimleikafelag, sum herfyri gjørdi bart í steypakappingunum í estetiskum fimleiki, hevur eisini nógvar fimleikarar, einar 1.200 í tali, umframt at felagið seinni í ár kann halda sín 100 ára stovningardag.

Eisini í Havnar Fimleikafelag legst aftrat alla tíðina, og nú talið á íðkandi er so stórt, hava tey valt at hava fýra framsýningar tilsamans. Tríggjar av teimum verða leygardagin og tann fjórða mánakvøldið.

Framsýningarnar eru deildar upp soleiðis, at leygardagin klokkan 10 eru tað smærri børn, eitt nú øll liðini við børnum undir skúlaaldri, sum sýna fram. Klokkan 13.30 eru tað eisini børn, sum sýna fram, eitt nú øll lið við børnum frá 1. til 3. flokk. Og klokkan 17 eru tað ung, eitt nú øll lið við ungum frá 4. til 6. flokk, sum sýna fram sín dugnaskap. Mánakvøldið klokkan 19 verður so framsýning við teimum vaksnu, frá 7. flokki og eldri. Nærri skrá sæst á heimasíðu felagsins, www.hf.fo.

Til allar fýra fimleikarafr amsýningarnar hjá Havnar Fimleikafelag verða framførslur við kappingarliðum í reiðskapi og estetiskum kappingarliðum, og harumframt verða merki og ídnisprógv handað fimleikarum eftir hvørja framsýning.

# Stjørnan og Tjaldur fyrsta finaludystin um tvær vikur



*Tjaldur tekur ímóti Stjørnuni í Runavík í fyrstu av FM-finalunum um júst tvær vikur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fyrsta av finalunum um føroyameistaraheitið í Sunset-kappingini verður í Runavík mikukvøldið 8. apríl, har Tjaldur tekur ímóti Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Líka til seinnapartin sunnudagin vóru trý lið um boðið at møta Stjørnuni í finalunum um føroyameistaraheitið hjá kvinnunum, men tá avtornaði, beindu VB og Neistin fyri hvørjumøðrum, tí tey spældu javnt, meðan Tjaldur við sigri á Stjørnuni vann sær pláss í finaluni, hóast eitt landskappingarumfar enn er eftir.

Nú er so ásett, nær finaludystirnir verða spældir. Lagt verður fyri í ítróttarhøllini í Runavík mikukvøldið 8. apríl, og síðani møtast liðini aftur leygardagin 11. apríl í KÍ-høllini í Klaksvík. Hevur hvørki liðið vunnið báðar tær undanfarnu finalurnar, verður ein møgulig triðja finala eisini í Klaksvík, og so verður hon mánadagin 13. apríl, sum er annar páskadagur.

Um hugt verður at teimum fýra landskappingardystunum millum Stjørnuna og Tjaldur í vetur, so hava teir samanlagt verið so javnir, at liðini hava vunnið tveir í part og Stjørnan hevur samanlagda málmunin 101-100. Tað vil siga, at um liðini skuldu endað jøvn í stigum í landskappingini undan finalunum, hevði Stjørnan framvegis havt fyrimunin við hesum eina málinum.

Stjørnan og Tjaldur møttust eisini í steypafinaluni í ár, sum var spæld í Havn tann 7. februar. Dysturin endaði við 25-23 sigri til Stjørnuna, sum hevur vunnið steypakappingina fimm av teimum síðstu seks árunum.

### Javnir dystir

Av teimum trimum, sum hava jagstrað møguleikan at sleppa í finalurnar ímóti Stjørnuni, hevur VB havt tey bestu úrslitini ímóti klaksvíkskvinnum at vísa á. Í teimum fýra dystunum ímóti Stjørnuni hava liðini vunnið hvør sínar tveir – og tvær ferðir hava tey vunnið við einum máli á hvørjum øðrum. Málmunurin fyri teir fýra dystirnar er púra javnur: 99-99.

Neistin hevur spælt ein javnleik og vunnið ein dyst ímóti Stjørnuni, sum so hevur vunnið tveir. Og samanlagt hevur Stjørnan í málum vunnið 101-79 á Neistanum, sum á pappírinum kanska sá út sum minst vandamikli avbjóðarin hjá Stjørnuni.

Alt hetta kann tó gera VB og Neistanum tað sama nú, tí fyri teirra viðkomandi er kappingarárið liðugt, hóast tey hava hvør sín dyst eftir at spæla. Tað sama hevur leingi verið galdandi fyri StÍF og Kyndil, sum stórt sæð alt árið hava verið eitt fitt petti aftan fyri tey fýra fremstu í Sunset-kappingini.